# P/F NORÐOYATUNNILIN

## TÓRSHAVN

## ÁRSROKNSKAPUR

## 2004

**(3. ROKNSKAPARÁR)**

**AVRIT**

**INNIHALDSYVIRLIT**

Síða


| | |
|---|---|
| Upplýsingar um felagið | 2 |
| Ársfrágreiðing | 3 |
| Leiðsluátekning | 4 |
| Grannskoðanarátekning | 4 |
| Nýttur roknskaparháttur | 5 |
| Rakstrarroknskapur 2004 | 6 |
| Fíggjarstøða pr. 31. desember 2004 | 7 - 8 |
| Gjaldførisfrágreiðing 2004 | 9 |
| Notur | 10 - 11 |

## UPPLÝSINGAR UM FELAGIÐ

**Felagið**

| | |
|---|---|
| Navn: | P/F Norðoyatunnilin |
| Heimstaður: | FO-100 Tórshavn |
| Skrásetingar-nr.: | P/F 3298 |
| Skattakommuna: | Tórshavnar Kommuna |
| Stovningardagur: | 21. desember 2001 |
| Roknskaparár: | 1. januar til 31. desember |
| V-tal: | 514.543 |

**Nevndin**
Bergur í Garði, búskaparfrøðingur, Tórshavn, formaður
Jens Kári Vilhelm, verkfrøðingur, Hoyvík, næstformaður
Heri M. Hammer, verkfrøðingur, Klaksvík
Oyvindur Brimnes, verkfrøðingur, Argir
Bjarni A. Bjarnason, verkfrøðingur, Tórshavn

**Stjórn**
David Reinert Hansen, verkfrøðingur, Oyri, stjóri

**Fíggjarleiðari**
Reinhold Isaksen, búskaparfrøðingur, Norðragøta

**Grannskoðan**
P/F Grannskoðaravirkið ***INPACT***
statsaut. revisorar
R. C. Effersøesgøta 26
Postrúm 191, FO-110 Tórshavn
Tlf.: 31 47 00 - Fax: 31 38 15
T-postur: inpact@inpact.fo
Heimasíða: www.inpact.fo

Ársroknskapurin 2004 góðkendur á felagsins aðalfundi, hin 27. juni 2005.

____________________
fundarstjóri

**ÁRSFRÁGREIÐING 2004**

**Virksemi**
Endamál felagsins er at gera tunnil millum Eysturoy og Borðoy og tilhoyrandi vegagerð, hava rakstur av tunlinum um hendi, umframt aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemið.

Felagsins virksemi í farna ári hevur í høvuðsheitum verið at liðugtgera kanningar og projekt, útbjóða vegarbeiði og fremja tunnilsarbeiði og hava eftirlit við byggiarbeiðnum.

**Lógargrundarlag**
Partafelagið varð stovnað við 30 mió.kr. játtan á eykafíggjarløgtingslógini fyri november 2001 og heimild í Ll. nr. 168 frá 21.12.2001 um "stovnan av partafelagi at gera fast samband um Leirvíksfjørð". Ognarrættur, eftirlit, peningajáttan, nýtslugjøld, ognartøka, skattlig viðurskifti, eftiransing og kunning verða formaliserað í Ll. nr. 33 frá 23.03.2002 (Anleggslógin) um "fast samband um Leirvíksfjørð". Játtaðar verða 205 mió.kr. upp til 235 mió.kr. til verkætlanina við Ll. nr. 108 frá 20.12.2002 um "broyting í Ll. um fast samband um Leirvíksfjørð". Við Ll. nr. 49 frá 10.04.2003 verður álagt landsstýrismanninum at leggja fram uppskot til løgtingslóg um atknýttar verkætlanir.

**Fíggjarliga gongdin**
Árið hjá felagnum royndist sum ætlað. Við tunnilsgerð sum einasta virksemi gav raksturin 2,2 mió.kr. í halli. Samanborið við -634 t.kr. í halli árið fyri.

**Menningarkostnaður**
Felagið hevur havt ávísan kostnað til at dagføra verkætlanir og kunnandi tiltøk og tilfar, ið eru kostnaðarførd.

**Íløgur**
Felagið hevur gjørt íløgur fyri 152 mió.kr. í tøkniogn, lendi, vegir- og undirsjóartunnil. Projekteringsarbeiðið er í høvuðsheitum gjørt liðugt. Arbeiðið uppá sjálvan undirsjóartunnilin, við tilhoyrandi vegum og brúgvum, er komið væl áleiðis.

**Hendingar aftaná roknskaparárslok**
Frá statusdegnum og til ídag er einki hent, sum avgerandi broytir metingina av ársroknskapinum, tó er á eykaaðalfundi 25. januar 2005 partapeningurin hækkaður við 32,5 mió.kr. uppí 95 mió.kr. Skotið varð ígjøgnum 25. juni 2005.

**Framtíðarútlit**
Roknast kann við rakstrarligum halli komandi árini fram til tunnilin verður tikin í nýtslu. Sambært Ll. (Anleggslógini) eru játtaðar 32,5 mió.kr. árliga í tíðarskeiðinum 2005 - 2008 og 42,5 mió.kr. í 2009 ella 205 mió.kr. upp til 235 mió.kr. í partapeningi.

**Partaeigaraviðurskifti**
Partapeningurin er kr. 62.500.000. Allur partapeningurin er ogn landsins. Eingin broyting er hend í samansetingini av partapeninginum.

**Býtið av ársúrslitinum**
Ársúrslitið er **kr. -2.237.072,** ið nevndin mælir til at býta soleiðis:

| | |
|---|---|
| Flutt úrslit frá undanfarnum árum | -1.225.291 |
| Ársúrlit 2004 | -2.237.072 |
| **At flyta til næsta ár** | **-3.462.364** |

**Eginpeningurin** verður nú **kr.** **59.037.636**

**LEIÐSLUÁTEKNING**

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og samtykt ársroknskapin við ársfrágreiðingini fyri 2004 hjá P/F Norðoyatunlinum.

Ársroknskapurin er settur upp samsvarandi ásetingum í galdandi ársroknskaparlóg.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, soleiðis at ársroknskapurin gevur eina rætta mynd av ognum og skyldum, fíggjarligu støðuni og rakstrarúrslitinum.

Ársfrágreiðingin og ársroknskapurin fyri 2004 verða hervið løgd fyri ársaðalfundin til góðkenningar.

Tórshavn, hin 27. juni 2005

| | | | |
|---|---|---|---|
| Stjórn: | David Reinert Hansen | | |
| Nevnd: | Bergur í Garði<br>formaður | Jens Kári Vilhelm<br>næstformaður | Heri Hammer |
| | Oyvindur Brimnes | Bjarni A. Bjarnason | |

**GRANNSKOÐANARÁTEKNING**

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá P/F Norðoyatunlinum, Tórshavn, fyri 2004, sum leiðslan hevur sett upp.

**Grannskoðanin**
Í samsvari við alment viðurkendar grannskoðanarmeginreglur hava vit lagt til rættis og framt grannskoðanina við atliti at fáa grundaða sannføring um, at tað ikki eru týðandi skeivleikar ella vanta týðandi upplýsingar í ársroknskapinum. Undir grannskoðanini hava vit, eftir meting um týdning og váða, kannað grundarlag og prógv fyri upphæddum og øðrum upplýsingum í ársroknskapinum. Vit hava samstundis tikið støðu til roknskaparháttin og tær roknskaparligu metingarnar, sum leiðslan hevur gjørt. Eisini hava vit mett um, hvørt upplýsingarnar í ársroknskapinum sum heild eru nøktandi.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**
Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin er greiddur í samsvari við tey krøv, ið føroyska lóggávan setur roknskaparhaldi, og at hann gevur rætta mynd av felagsins ognum og skyldum, fíggjarligu støðuni og rakstrarúrslitinum.

Tórshavn, hin 27. juni 2005

**P/F Grannskoðaravirkið *INPACT***
statsaut. revisorar

| | |
|---|---|
| Jógvan Amonsson<br>statsaut. revisor | Alvi S. S. Nielsen<br>skrás. grannskoðari |

## NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

### Alment
Roknskapurin er uppsettur eftir galdandi partafelags- og ársroknskaparlóg og roknskaparkunngerð. Rakstrarroknskapurin er uppsettur eftir greinbýttum frásøguhátti og fíggjarstøðan eftir kontuhátti. Roknskaparhátturin er óbroyttur frá árinum fyri.

### Inntøkur og rakstrarkostnaðurin
Inntøkur og kostnaðurin, ið hoyrir árinum til verður rakstrarførdur við tíðaravmarkingum.

### Rentur
Rentuinntøkan er samsvarandi tilskrivaðu rentu á innlánskontu felagsins í 12 mánaði tíðarskeiðnum í árinum.

### Skattur
Tað áhvílir hvørki partafelagsskattur ella eventualskattur á felagnum fram til árslok.

### Materiell støðisogn
Undirsjóartunnil í gerð er tikin við til útvegnarvirði. Arbeiðið higartil fevnir um kostnaðir til forkanningar, projektering, endurgjald fyri lendi, og higartil framdu vega- og tunnilsgerðina. Byrjað verður ikki at avskriva undirsjóartunnilin við tilhoyrandi vegum og brúgvum, fyrr enn latið verður upp fyri ferðslu.

Tól, ið kosta minni enn kr. 20.000, verða kostnaðarførd.

### Áogn
Áogn til góðar er tikin við til áljóðandi virði. Avsett verður ímóti tapsvanda.

### Vøru- og tænastuskuld
Vøru- og tænastuskuld er tikin við til áljóðandi virði. Skuld í fremmandum gjaldoyra er tikin við til kurs við árslok. Kursvinningur og kurstap, bæði ásannað og ikki ásannað, eru tikin við í rakstrarroknskapinum.

### Veðhalds- og eventualskyldur
Veðhalds- og eventualskyldur eru upplýstar og avsettar eftir neyðugum tørvi aftast í roknskapinum.

### Gjaldførisfrágreiðing
Gjaldførisfrágreiðing er uppsett eftir óbeinleiðisháttinum og vísir gjaldførisávirkan frá rakstri, íløgum og fígging. Gjaldførið við ársbyrjan og við ársenda eru samansett av tøkum peningi, frádrigið saldu á rakstrarláni.

## RAKSTRARROKNSKAPUR 2004

| | Nota | 2004 | t.kr. 2003 |
|---|---|---|---|
| Rakstrarkostnaður | | -75.231 | 0 |
| Fyrisitingarkostnaður | | -409.414 | -597 |
| **Bruttoúrslit** | | **-484.645** | **-597** |
| Starvsfólkakostnaður | 1 | -813.680 | -659 |
| Rakstrar- og fyrisitingargjøld | | -948.124 | -953 |
| **Úrslit, frá primerum rakstri** | | **-2.246.449** | **-2.209** |
| Rentuinntøkur o.t. | | 330.649 | 1.575 |
| Rentukostnaður o.t. | | -321.272 | 0 |
| **Ársúrslit** | | **-2.237.072** | **-634** |

Býtið av úrslitinum sæst í ársfrágreiðingini.

## FÍGGJARSTØÐA PR. 31. DESEMBER 2004

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | | t.kr. |
| **OGN** | Nota | 2004 | 2003 |
| Lendi, vegir og undirsjóartunnil (í gerð) | 2 | 168.468.945 | 16.487 |
| **Materiell støðisogn tilsamans** | | **168.468.945** | **16.487** |
| Vøru- og tænastuáogn | | 3.350.501 | 1 |
| Meirvirðisgjald | | 7.434.824 | 1.826 |
| **Áogn tilsamans** | | **10.785.325** | **1.827** |
| Innlánspeningur | | 8.860.144 | 45.843 |
| **Peningur tilsamans** | | **8.860.144** | **45.843** |
| **Ogn í umferð tilsamans** | | **19.645.469** | **47.671** |
| **OGN TILSAMANS** | | **188.114.413** | **64.158** |

## FÍGGJARSTØÐA PR. 31. DESEMBER 2004

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | | t.kr. |
| **SKYLDUR** | Nota | 2004 | 2003 |
| Partapeningur | 3 | 62.500.000 | 62.500 |
| Flutt úrslit | | -3.462.364 | -1.225 |
| **Eginpeningur tilsamans** | 4 | **59.037.636** | **61.275** |
| Íleggingargrunnurin fyri Føroyar, byggilán | | 124.200.000 | 0 |
| **Langfreistað skuld tilsamans** | | **124.200.000** | **0** |
| Roknað renta, byggilán | | 327.750 | 0 |
| Vøru- og tænastuskuld | | 3.819.136 | 874 |
| P/F Vágatunnilin, millumrokning | | 729.891 | 2.010 |
| **Stuttfreistað skuld tilsamans** | | **4.876.777** | **2.883** |
| **Skuld tilsamans** | | **129.076.777** | **2.883** |
| **SKYLDUR TILSAMANS** | | **188.114.413** | **64.158** |

## GJALDFØRISFRÁGREIÐING 2004

| | | |
|---|---:|---:|
| | | t.kr. |
| | <u>2004</u> | <u>2003</u> |
| Úrslit, av primerum rakstri | -2.246.449 | -2.209 |
| <u>Broytingar í ogn í umferð</u> | | |
| Vøru- og tænastuáogn | -3.349.022 | -1 |
| Meirvirðisgjaldsáogn | -5.609.135 | -1.770 |
| Tilgóðahavandi partapeningur | 0 | 32.500 |
| <u>Broytingar í stuttfreistaðari skuld</u> | | |
| Vøru- og tænastuskuld | 2.945.396 | 845 |
| Millumrokningin, P/F Vágatunnilin | <u>-1.279.636</u> | <u>513</u> |
| **Gjaldførisúrslit, frá primerum rakstri** | **-9.538.847** | **29.878** |
| Rentuinntøkur | 330.649 | 1.575 |
| Rentukostnaður | <u>-321.272</u> | <u>0</u> |
| **Gjaldførisúrslit, frá rakstri** | **-9.529.470** | **31.453** |
| Íløgur í undirsjóartunnil v.m. í gerð | <u>-151.981.499</u> | <u>-12.197</u> |
| **Gjaldførisúrslit, eftir íløgur** | **-161.510.969** | **19.256** |
| Lántøka í árinum | <u>124.527.750</u> | <u>0</u> |
| **Gjaldførisúrslit, eftir fígging** | **-36.983.219** | **19.256** |
| Tøkur peningur, primo | <u>45.843.363</u> | <u>26.587</u> |
| **Tøkur peningur, ultimo** | **<u>8.860.144</u>** | **<u>45.843</u>** |

Felagið hevur eina samlaða byggilánsjáttan frá Íleggingargrunninum fyri Føroyar uppá 270 mió.kr. Við árslok 2004 vóru 124,2 trektar. Sostatt eru 145,8 tøkar eftir við árslok 2004.

## NOTUR TIL ROKNSKAPIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | | | | t.kr. |
| | | | 2004 | 2003 |
| **Nota 1. Starvsfólkakostnaður** | | | | |
| Lønir | | | 723.153 | 613 |
| Eftirlønir | | | 42.055 | 40 |
| Almenn lønargjøld | | | 10.577 | 7 |
| Starvsfólkakostnaður | | | 37.896 | 0 |
| | | | **813.680** | **659** |
| Harav til: | | | | |
| Stjórn | | | 431.553 | 397 |
| Nevnd | | | 291.600 | 216 |
| Ársverk felagið hevur havt er umleið | | | 2 | 2 |
| | | | (í gerð) Lendi, vegir og undirsjóartunnil | |
| **Nota 2. Materiell støðisogn** | | | | |
| Virði 01.01.2004 | | | 16.487.446 | |
| Tilgongd 2004 | | | 151.981.499 | |
| Frágongd 2004 | | | 0 | |
| Virði 31.12.2004 | | | 168.468.945 | |
| Avskrivingar 21.12.2004 | | | 0 | |
| Avskrivingar 2004 | | | 0 | |
| Avskrivingar 31.12.2004 | | | 0 | |
| **Bókført virði 31.12.2004** | | | **168.468.945** | |
| Bókført virði 31.12.2003 | | | 16.487.446 | |
| **Nota 3. Partapeningur** | | | | |
| Partapeningurin er býttur upp í hesar flokkar: | | | | |
| 1 | A-partabræv á | 30.000.000 | 30.000.000 | 30.000 |
| 1 | A-partabræv á | 32.500.000 | 32.500.000 | 32.500 |
| | | | **62.500.000** | **62.500** |

| | | |
|---|---|---|
| | | t.kr. |
| | 2004 | 2003 |
| **Nota 4. Eginpeningur** | | |
| Partapeningur | 62.500.000 | 62.500 |
| Flutt úrslit frá undanfarnum árum | -1.225.291 | -591 |
| Fluttur partur av úrslitinum í árinum | -2.237.072 | -634 |
| Flutt úrslit | -3.462.364 | -1.225 |
| **Eginpeningur tilsamans** | **59.037.636** | **61.275** |

**Veð- og eventualskyldur**

Felagið hevur 12. november 2003 undirskrivað lánisáttmála við Íleggingargrunnin fyri Føroyar um byggilán kr. 270.000.000. Sum trygd verður veitt skaðaloysisbræv kr. 300.000.000 við 1. veðrætti í tunnilsmunna báðumegin við, herundir veg, til- og frákoyring, øllum installatiónum og annars alt, ið vanliga hoyrir til. Ognar- og matrikuleringsviðurskiftini eru ikki komin uppá pláss við roknskaparárslok 2004.

Í sambandi við projektering, eftirlit, vega-, el- og tunnilsgerð hevur felagið undirskrivað sáttmálar fyri 300 mió.kr. pr. 30. mai 2005.

**Tryggingarviðurskifti**

| | |
|---|---|
| All Risk Entreprisetrygging: | |
| Entreprisetrygging + 30% | 310.000.000 |
| Max. pr. skaða fyri tíðina | 20.000.000 |
| Ábrygd stjórn og nevnd, max. pr. skaða | 10.000.000 |
| | **340.000.000** |